# Vilt tú arbeiða saman við okkum?

## Vit sóknast eftir 4 nýggjum starvsfeløgum!



TEAM85

**Hjá okkum:**

- **er samskifti við allan heimin dagligur kostur**
- **hendir alla tíðina okkurt nýtt og spennandi**
- **arbeiða vit sjálvstøðugt við frælsi undir ábyrgd**
- **eru nýskapan og øðrvísi hugskot vælkomin**
- **eru vit ikki bangin fyri at sjóseta nýggjar verkætlanir**
- **eru nærløgd tænasta, dygd, professionalisma, opinleiki og tolsemi ein sjálvfylgja**
- **lyfta vit í felag og eru ikki ov fín til at rætta eina hjálpandi hond, tá tørvur er á tí**
- **eru vit fleksibul og skjót at laga okkum til umskifti**
- **lurta vit eftir atfinningum - og læra av teimum**

**Vilt tú átaka tær eitt avbjóðandi starv á Føroya kanska mest spennandi arbeiðsplássi, har tú f ært eina rúgvu av virðismiklum royndum at seta á C.V.'ið?**

## Deildarleiðari til marknaðar- og samskiftisdeildina

sum kann marknaðarføra Føroyar á ein fangandi øðrvísi hátt. Vilt tú vera við til at marknaðarføra føroyskar vørur, tænastur og upplivingar úti í heimi?

- Brennir tú fyri marknaðarføring, lýsingum og alheims samskifti? Hevur tú fingurin á altjóða pulsinum og kennir tú alheimsrákið?
- Ert tú framfýsin og dugir væl at føra teg fram millum fólk høg sum lág heima sum úti?
- Hevur tú høvdið fult av hugskotum um, hvussu føroyskar vørur, tænastur og upplivingar kunnu marknaðarførast úti í heimi? Dugir tú væl at ráðgeva øðrum um marknaðarføring?
- Hevur tú gott innlit í málbólkagreining? Hugsar tú langskygt og dugir tú at leggja langtíðar marknaðarføringsstrategiir?
- Dugir tú væl at samskipa eitt nú lýsingarherferðir, framsýningar o.t.?
- Dugir tú væl at skriva fangandi tekstir?
- Hevur tú útbúgving á kandidátstigi t.d. í marknaðarføring ella líknandi útbúgving?
- Hevur tú royndir t.d. frá reklamuvirki ella størri fyritøkum sum fyriskipari ella líknandi?
- Dugir tú væl at samskifta skrivliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum ella øðrum altjóða máli?
- Dámar tær væl avbjóðingar, arbeiðir tú sjálvstøðugt og ert tú full/ur av virkishuga?

## Verkætlanarleiðari

sum kann ráðgeva føroyskum fyritøkum og hevur hug og hegni til at skapa økt samstarv og netverk í føroyskari vinnu.

- Brennir tú fyri ídnaðar- og vinnulívs-spurningum? Hevur tú gott innlit í, hvat rørir seg á vinnulívsøkinum bæði her heima og úti í heimi?
- Ert tú heimavand/ur, tá tosað verður um leiðslu, rakstur, fyrisiting, fíggjarætlanir, roknskap, íløgur, útflutning og vinnu-politikk?
- Hevur tú høvdið fult av hugskotum um, hvussu vit veita vitan um menning av burðardyggum vinnum í Føroyum?
- Heldur tú, at burðardygg vinna snýr seg um meir enn tøl og pengar?
- Dugir tú væl at seta teg inn í hugskot hjá øðrum og hevur tú skil fyri at føra tey út í lívið?
- Hevur tú útbúgving á kandidátstigi t.d. í búskapi, verkfrøði ella líknandi útbúgving?
- Hevur tú royndir t.d. sum íverksetari?
- Dugir tú væl at samskifta skrivliga? Og hevur tú góðar førleikar í føroyskum, norðurlendskum og enskum ella øðrum altjóða máli?
- Dámar tær væl avbjóðingar, arbeiðir tú sjálvstøðugt og ert tú full/ur av virkishuga?

## Verkætlanarleiðari

sum kann menna føroyska upplivingarvinnu t.d. havfisking, kaving, fjallaklintring, surfing o.m.a. Vilt tú vera við til at skapa nýggjar føroyskar ferðavinnutænastur og upplivingar?

- Brennir tú fyri ævintýrligum avbjóðingum? Dámar tær væl at bróta upp úr nýggjum? Og kundi tú hugsað tær at fáa gongd á upplivingarvinnuna í Føroyum?
- Hevur tú høvdið fult av hugskotum um nýggjar og/ella betri tænastur og upplivingar fyri ferðafólk í Føroyum?
- Ert tú skjót/ur til at síggja møguleikar heldur enn forðingar?
- Dámar tær væl at samskifta og netverka eisini í altjóða høpi?
- Dugir tú væl at seta teg inn í hugskot hjá øðrum, og hevur tú skil fyri at føra tey út í lívið?
- Dugir tú væl at samskipa og at arbeiða í toymum og netverkum?
- Hevur tú útbúgving á kandidátstigi t.d. í ferðavinnu, handilsskapi, marknaðarføring, búskapi ella líknandi útbúgving?
- Hevur tú royndir sum fyriskipari t.d. innan ferðavinnu?
- Dugir tú væl at samskifta skrivliga og hevur tú góðar førleikar í føroyskum, norðurlendskum og enskum ella øðrum altjóða máli?
- Dámar tær væl avbjóðingar, arbeiðir tú sjálvstøðugt og ert tú full/ur av virkishuga?

## Heimasíðusmiður

sum meistrar internetsamskifti og sniðgeving til fingraspíssarnar. SamVit leggur nú væl størri áherðslu á internetið sum samskiftismiðil og -amboð. Vilt tú vera við til at gera ein nýggjan portal, umframt umsita fleiri heimasíður?

- Ert tú tøknisnillingur? Og brennir tú fyri at arbeiða við internetinum? Metir tú teg føran fyri støðugt at kunna fylgja við og seta teg inn í nýggja tøkni og nýggj forrit?
- Hevur tú skil fyri at arbeiða við CMS-skipanum og dátugrunnum?
- Hevur tú skil fyri heimasíðusniðgeving? Dugir tú myndaviðgerð i t.d. Photoshop og Flash scripting? Hevur tú skil fyri t.d. HTML, CSS, SQL, ASP (VBscript) ella líknandi?
- Dugir tú at arbeiða við teimum nýggjastu samskiftisamboðunum, so sum t.d. pod-casting, rss osfr.?
- Hevur tú høvdið fult av hugskotum um, hvussu hesi amboð best kunnu brúkast sum samskiftisamboð?
- Dugir tú væl at skilja hugskot hjá øðrum og gera tey verulig?
- Hevur tú hug til at menna internet-tænasturnar hjá SamVit saman við sam-skiftisfólki á stovninum?
- Dugir tú væl at samskifta skrivliga og hevur tú góðar førleikar í føroyskum, norðurlendskum og enskum ella øðrum altjóða máli?
- Dámar tær væl avbjóðingar, arbeiðir tú sjálv-støðugt og ert tú full/ur av virkishuga?

Hevur eitt ella fleiri av omanfyrinevndu størvum tín stóra áhuga og passa lýsingarnar til tín so send eina umsókn til:

**SamVit, Bryggjubakki 12, Postboks 259,**
**FO-110 Tórshavn.**
**Att.: Elin Heinesen, stjóri.**

- eisini hóast tú kanska ikki heilt lýkur allar treytirnar. Tað er tó eitt krav, at tú dugir at tosa og skriva á føroyskum. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 27.aug. 2007. Umsóknir kunnu eisini sendast umvegis teldupost: **trade@trade.fo** ella **tourist@tourist.fo**

Spurningar í sambandi við starvið kunnu setast til Elina Heinesen, stjóra á SamViti, tlf. 353100.

Tú byrjar í starvinum sum skjótast ella í seinasta lagi 1. okt. 2007. Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

SamVit er ein almennur stovnur, sum fevnir um fyrrverandi Ferðaráð Føroya og Menningarstovuna, ið løgdu saman um ársskiftið 2006-2007. SamVit skal sum stovnur virka sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi vinnupolitikki landsins, og høvuðsuppgávurnar sambært hesum eru m.a.: At birta uppundir nýskapan og íverksetan. Í samstarvi við aðrar myndugleikar at samskipa mannagongdir innan fyrisiting, sum hava týdning fyri tær einstøku fyritøkurnar. At menna føroyska vinnu. At marknaðarføra føroyskar vørur og tænastur og Føroyar sum eitt land at gera íløgur í. Og at menna ferðavinnuna í Føroyum og at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland.

SamVit
Faroe Islands Enterprise